Tunnilin ímillum Øravík og Hov er komin í vanda

– Vandi er fyri, at ætlanin at gera tunnil ímillum Øravík og Hov verður slept, ella í hvussu so er seinkað, sigur Hergier Nielsen, løgtingsmaður

HOVSTUNNIL
Aki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Ætlanin at gera tunnil ímillum Øravík og Hov, er komin í vanda.

Tað ivast Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, ikki í.

Hann sigur, at tað, sum er komið frá hesi samgonguni í sambandi við tunnilin, kann ikki tulkast øðrvísi, enn at ætlanin er at draga í land við ætlanini at gera tunnil ímillum Øravík og Hov.

Hann stúrir fyri, at ætlanin er heilt at sleppa ætlanini at gera tunnilin. Í øðrum lagi stúrir hann fyri, at ætlanin kemur í drag.

Løgtingsmaðurin vísur á, at nú samgongan hevur lagt uppskot til fíggjarlóg fyri fyri løgtingið, stendur svart upp á hvítt, at nú skal metast um, hvussu stóra nyttu hesin tunnilin ger afturímóti tí, sum hann kostar.

– Hetta sigur mær so mikið sum tað, at nú skal samgongan meta um, antin hesin tunnilin nú er so neyðugur. Nakra aðra orsøk til at gera eina offur-gagn greining, dugi eg ikki at sígga, sigur Hergeir Nielsen.

Pumpar prísin upp

Hann vísir eisini á, at eftir hansara tykki, roynir landsstýrismaðurin í vinnumálum at pumpa prísin fyri tunnilin upp.

– Bjarni Djurholm hevur upplýst, at tunnilin fer at kosta 120 milliónir. Síðani hevur hann boðað frá, at hann fer at kosta 130 milliónir og nú fíggjarlógin er løgd fram, verður mett, at tunnilin fer at kosta einar 140 milliónir.

Hetta er tað sama, sum tunnilin, ið Landsverkfrøðingurin ætlaði at gera uppi í fjallinum, varð mettur at kosta.

Hergeir Nielsen heldur, at tað er sera átaluvert at tað almenna skal ganga á odda í at pumpa prísin uppeftir. Hann vísir á, at NCC hevur mett, at tunnilin fer at kosta 90 milliónir.

Men nú landsstýrismaðurin sjálvur boðar frá, at mett verður, at hon fer at kosta 140 milliónir, er tað sjálvsagt, at teir, sum bjóða, fara at leggja seg væl hægri, enn teir upprunaliga høvdu ætlað.

– Sostatt hevur Bjarni Djurholm verið við til at dýrka tunnilin, leggur hann afturat.

Hergeir Nielsen sigur, at hetta er ikki tað einasta, sum eftir hansara tykki boðar frá, at samgongan er farin at draga í land við tunlinum.

Hergeir Nielsen sigur, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er farin at sáa iva um ætlanina at gera berghol ímillum Øravík og Hov

– Bjarni Djurholm hevur boðað frá, at tilfarið í fjallinum er stak vánaligt, hóast teir, sum hava borað kjarnuboringar siga, at tað er heilt gott.

– Og nú ætlar Bjarni Djurholm at gera eina kjarnuboring afturat. Hinar tríggjar kjarnuboringarnar, sum vórðu gjørdar, tóku tað mesta av einum ári og hendan kjarnuboringin fer helst eisini at taka tað mesta av hesum árinum.

Men samgongan ætlar at seta fimm milliónir av til tunnilir av á fíggjarlógini?

– Samgongan sigur, at tað er sett av til at fyrireika eina útbjóðing. Men vit hava sett pening av til arbeiðið í fleiri ár, men Bjarni Djurholm hevur onki gjørt við málið. Og eg haldi, at tað, sum nú fer fram, vísir, at landsstýrismaðurin sáar iva um málið, sigur Hergeir Nielsen.

Hann vísir annars á, at í seinastu samgongu varð avtalað at koyrast skuldi ígjøgnum tunnilin í 2006.

Hetta sigur fíggjarlógin um tunnilin

Hetta er tað, sum stendur í uppskotinum til fíggjarlóg um ætlanina at gera tunnil ímillum Øravík og Hov

Tað verða játtaðar 5 mió kr. til tunnilsgerð millum Øravík og Hov í 2004. Endalig avgerð er ikki tikin um linjuføring, so torført er at meta um kostnaðin. Ein jarðfrøðis- og byggitøknilig frágreiðing og meting er gjørd av tunli niðri í dalinum, har eisini fyribils kostnaðarmetingar eru gjørdar. Mett verður, at kostnaðurin av tunli í dalinum er einar 140 mió kr. tilsamans, sum er nakað tað sama sum upprunaliga verkætlanin, har tunnilslinjan liggur nakað ovari. Týðandi óvissur eru í hesum metingum, og er ætlanin at brúka ein part av játtanini til at gera eina váðameting og til at gera fleiri jarðfrøðiligar kanningar, soleiðis at kostnaðarmetingarnar verða neyvari, og tað kann verða mett um fíggjarligu váðarnar í ymsu loysnunum. Eisini verður mett um kostnaðin í mun til nyttuna

Tunnilin ímillum Øravík og Hov er í góðum hondum

– Arbeiðið at fyrireika tunnil ímillum Øravík og Hov, gongur so skjótt, sum tað yvirhøvur kann, sigur BjarniDjurholm, landsstýrismaður. Tað er greitt, at tunnilin skal vera niðri í dalinum, sigur Henrik Old, løgtingsmaður

HOVSTUNNILIN
Aki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Arbeiðið at gera tunnil ímillum Oravík og Hov er í góðum og tryggum hondum.

Tað staðfestir Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann vísir staðiliga aftur, tí sum Hergeir Nielsen førir fram um, at samgongan í veruleikanum súltar ætlanina at gera tunniln ímillum Øravík og Hov.

Tvørturímóti vísir Bjarni Djurholm á, at samgongan arbeiðið so skjótt, sum hon kann við málinum.

– Er tað nakað, so leggur hendan samgongan størri dent á at fáa ætlanina framda enn undanfarna samgongan gjørdi.

Hann sigur sostatt, at málið gongur sína gongd.

So gott grundarlag sum gjørligt

Bjarni Djurholm sigur, at norski ráðgevarin hjá Landsverkfrøðinginum hevur mælt til, at gera eina kjarnuboring afturat.

– Hetta arbeiðið sleppur Landsverkfrøðingurin ikki í holt, fyrrenn fíggjarlógin er samtykt, tí hann hevur ikki pening til tað í løtuni.

Hann sigur, at so skjótt fíggjarlógin er samtykt, fer Landsverkfrøðingurin at gera kjarnuborngina, sum skal gerast.

– Síðani skal so ein projektering gerast og verklagslóg gerast. Ikki fyrrenn tá kann endaliga politiska viðgerðin vera, har verklagslógin skal samtykkjast.

Stóri spurningurin er so um tunnilin verður niðri í dalinum, har NCC hevur bjóðað sær til at gera hana, ella um hon verður longri uppi í fjallinum, har Landsverkfrøðingurin skeyt upp at gera hana?

– Vit arbeiða eftir eini ætlan, har Landsverk-frøðingurin fyrireikar ein tunnil í neðra. Men enn er jarðfrøðiliga óvissan ov stór til at vit kunnu gera eina verklagslóg. Fyrrenn seinasta kjarnuboringin er gjørd, hava vit sostatt ikki fullgott grundarlag at taka støðu útfrá, sigur landsstýrismaðurin.

Nú fíggjarlógin var til viðgerðar, fýltust Hergeir Nielsen á, at tú hevði upplýst, hvat arbeiðið er mett at kosta, tí hann metir, at tað fer at dýrka arbeiðið.

– Tað er høpisleyst. Bæði táið tunnilin undir Vestmannasundi varð gjørdur og nú tunnil verður gjørdur undir Leirvíksfjørð, hevur verið upplýst, hvat arbeiðið varð mett at kosta og tað er onki undarligt í tí. Tað er kapping ímillum teir, sum bjóða og teir, sum koma við lægsta tilboðnum, fáa arbeiði.

Hví er ætlanin nú at gera útrokningar av, hvør nytta er í tunlinum afturímóti tí, sum hann kostar. Hetta er ikki gjørt fyri at meta um, hvør nytta er í einum tunli yvirhøvur. Men ætlanin er at rokna út, hvat tær ymsu linguføringarnar kosta at bora afturímóti teirri nyttu, sum fæst burturúr. Tað er ikki meiri enn rímiligt og tað seinkar ikki ætlanini tað allarminsta, sigur .

Tvey uppskot eru um, hvar tunnilin ímillum Øravík og Hov skal borast. Inntøkini eru, har rundingarnir eru. NCC hevur bjóðað sær til at gera tann niðara tunnilin, sum er nógv betri fyri ferðsluna. Landsverkfrøðingurin ætlaði at gera tann ovara, har jarðfrøðiligu viðurskiftini eru tryggari. Bæði Bjarni jurholm, landsstýrismaður og Henrik Old, Løgtingsmaður siga, at arbeitt verður útfrá, at tunnilin verður í neðra

Kjakið er liðugt

Eisini Henrik Old, løgtingsmaður úr Suðuroy, sum eisini er í samgongu, vísir aftur, at ætlanin at gera tunnilin er súltað.

– Tað er stór semja um, at tunnilin skal gerast nú.

Samstundis staðfestir hann, at kjakið um, hvar tunnilin skal vera, er liðugt.

Sostatt staðfestir hann, at tunnilin skal vera niðri í dalinum, har hann liggur nógv betri fyri ferðsluna. Og sostatt staðfestir hann eisini, at ætlanin at gera tunnilin uppi í fjallinum, har Landsverkfrøðingurin ætlaði at gera hann, er slept.

– Norski ráðgevarin hjá Landsverkfrøðinginum hevur mælt til at gera eina kjarnuboring afturat og tað kunnu vit ikki vera ímóti.

– Tað er umráðandi at hava so gott grundarlag sum gjørligt, tá ið arbeiðið verður boðið út, tí er útbjóðingargrundarlagið ikki nóg gott, og trupulleikar stinga seg upp, heftir útbjóðarin fyri eykaútreiðslunum.

– Einasta ivamálið, sum nú er um, er akkurát, hvørja linjuføring niðri í dalinum, sum borast skal eftir, og um tunnilin kemur at snara eitt sindur hendavegin ella handavegin, tí onkustaðni er grótið eitt sindur ivingarsamt.

– Tað hevur ongan týdning sum so. Tað einasta, sum hevur týdning er, at tunnilin fer inn í neðra og kemur út aftur í neðra. Og tað liggur fast, sigur Henrik Old.

Vit spurdu eisini Henrik Old, hví ætlanin er nú at gera útrokningar fyri, hvussu stór nytta er í tunlinum afturímóti tí, sum hann kostar.

– Hetta má vera ein leivd frá Carragata- álitinum . Eg dugi ikki at síggja nakað endamál við tí, tí vit hava longu gjørt av, at tunnilin skal gerast, sigur Henrik Old.

Prestahjún til Tanzania

Í august mánaði í ár fara Anne Lena og Peter O. K. Olofson til Tanzania, har bæði skulu undirvísa. Hann komandi prestum og hon komandi prestafrúum. Tey hava bundið seg til tilsamans fýra ár í Tanzania, og bæði vænta tey, at tá leiðin gongur heimaftur, verður tað aftur til Føroyar

SAMRØÐA
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo



Prestahjúnini Anne Lena og Peter O. K. Olofson fara til Tanzania í august mánaði, har tey skulu undirvísa komandi prestum og prestafrúum

Klaksvík:
Anne Lena og Peter O. K. Olofson hava búð í Føroyum í 15 ár. Harav tey fýra í Klaksvík. Teimum hava dámt sera væl í Føroyum, og tey síggja tað sum teirra heimland í dag. Men útlongsilshugurin hjá teimum báðum er farin at gera um seg, og í august mánaði gongur leiðin hjá teimum til Tanzania at undirvísa. Tað er Lutherska Missionsfelagið í Danmark saman við Kirkjuliga Missiónsfelagnum í Føroyum, sum stendur aftan fyri hesum.

Anne Lena sigur, at tá ein hevur rundað tey fimti árini, tá er ein farin um eitt knapt sving í lívinum.

– Um ein hevur nakrar dreymar ella ynski um at gera eitt ella annað, so skal tað vera nú, tá ein er komin í mín aldur, sigur hon.

Og heldur fram, at tað ræður um at liva sítt lív og fullføra dreymarnar í staðin fyri at enda við at sita gamal og pensjoneraður og angra alt tað, sum ein ikki fekk gjørt.

Tey bæði eiga trý vaksin børn, so tað ger tað enn lættari hjá teimum at flyta í eitt longri tíðarskeið. Báðir synirnir eru so mikið vaksnir, at teir skulu giftast í summar, so tað verður eitt tað seinasta Olofson ger, áðrenn leiðin gongur til Tanzania.

So eiga tey eina 16 ára gamla dóttir, sum ikki er sinnað at koma við teimum. Hon verður verandi í Føroyum og fer at taka 10. flokk í Ósáskúlanum.

– Hon er niðri á eftirskúla nú, men hjá henni er ikki talan um at fara nakra aðrastaðni enn aftur til Klaksvíkar í fyrstu atløgu, so ein familja hevur boðið sær til, at hon kann búgva hjá teimum, meðan vit eru burtur, og tað er hon hjartansfegin um, greiðir Anne Lene frá.

Bæði siga tey tó, at tað er lítil og ongin ivi um, at tá tey skulu heimaftur, so koma tey aftur til Føroya.

– Vit lata øll okkara ting standa her í øllum førum, siga tey.

Læra swahili

Prestahjúnini fara úr Føroyum tann 8. august, og tá gongur leiðin til Tanzania. Tey skulu fyrst á ein málskúla, har tey skulu læra swahili, sum er annað málið, ið verður undirvíst á. Málskúlin byrjar í juli, men tey bæði fara ikki úr Føroyum fyrr enn fyrst í august. Tá fara tey so beint á málskúlan, har tey verða til einaferð í november. Síðani gongur leiðin til hendan prestaskúlan, har bæði skulu undirvísa tey komandi trý árini ella so.

At læra swahili er sum skilst ikki so øgiliga torført. Tey bæði hava fingið ta fatan frá øðrum, tey hava tosað við, at tað er ikki so ringt.

Prestur sigur, at hann hevur tosað við ein prest, sum hevur arbeitt har. Hesin presturin prædikaði á swahili hvønn sunnudag, men hann brúkti mest sum alla vikuna til at skriva prædikuna í fyrstuni. Inntil hann hevði vant seg við málið.

Tríggjar ymiskar útbúgvingar eru at fáa á prestaskúlanum, har tey skulu undirvísa. Eitt er fyri prestakonurnar, og so eru tvey til prestarnar. Eitt skeið er trý ár, og har verður undirvíst á swahili, meðan hitt varar í fýra ár, og har verður undirvíst á enskum. Hetta seinna skeiðið svarar til tann fyrra partin av útbúgvingini, sum vit kenna hana úr til dømis Danmark. Tað vil siga tað sama sum ein bachelorútbúgving.

Sunn kirkja

Prestur er sannførður um at tað er ein stór avbjóðing hjá teimum báðum at fara so langt, men samstundis er hann ikki í iva um, at tað er nakað, sum tey við gleði taka av.

– Onkuntíð skal ein seta sær sjálvum tann spurningin, hvat ein í veruleikanum vil. Hvat eins eginleikar kunnu nýtast til og so framvegis. Og tá teimum tørvar fólk at undirvísa teirra prestum í Tanzania, so er tað okkara uppgáva at taka av einum slíkum kalli, sigur hann.

Hann tosar eitt sindur um trúðarbýti í afrikanska landinum. Har er ein triðingur av fólkaslagnum kristin. Og hóast har eru fleiri trúargreinir, so heldur prestur, at um ein hyggur at kirkjuni har, so er hon upp á nógvar mátar ein sunnari kirkja enn í vesturheiminum.

– Nógvar kirkjur í vesturheiminum eru í upploysing, tá hugsað verður um læru og etikk. Serliga við tí seinasta nýggja, at nú skulu tær góðtaka at víga samkynd. Afrikanskar kirkjur eru sera trúfastar móti Bíbliuni, og haldi eg, at okkara kirkjur her um leiðir kunnu koma at hava tørv á hjálp frá teimum afrikansku kristnu kirkjunum. Og møguliga kundu tær beint okkum inn aftur á kósina, sum vísir hvat ein kristin kirkja er, sigur Peter O. K. Olofson.

Og hann heldur fram, at hann bert hevur alt gott at bera teimum, sum til dømis arbeiða í fiskivinnuni ella líknandi.

– Tað er eisini ein tænasta fyri Gudi, men tað er eitt privilegium fyri okkum at kunna vera við til at útbúgva komandi prestar og prestafrúur, sigur hann.

Tey bæði eru eisini samd um, at tað er ótrúliga gott og mennandi fyri báðar partar, at eisini prestafrúurnar verða útbúnar á sama staði sum prestarnir.

– Tað at vera prestur fevnir jú ikki bert um ein sjálvan. Tað fevnir um alla familjuna, sigur Peter.

Anne Lene væntar, at hon fer eisini at undirvísa komandi prestafrúunum í trúarlæru, etikki og Bíbliu tulking og eitt nú sunnudagsskúlaarbeiði. Og bara hvussu tað er at vera prestafrúa. Nakað, sum hon má sigast at hava drúgvar royndir í eftirhondini.

Millum afrikanarar

Tá tosið fellur inn á, hvat tey vænta, tá tey eru komin har, er eitt tað fyrsta, sum tey nevna, at tey koma at verða millum afrikanska fólkið.

– Vit verða tey einastu donsku har, so eg trúgvi, at vit fara at koma nógv saman við fólkinum har, sigur Anne Lene. Og bæði halda tey, at tað er ein fyrimunur, at tað ikki er ein sokallað skandinavisk koloni, har øll norðurlendsk so uttan iva høvdu hildið saman.

– Tað verður uttan iva spennandi. Og tað er meiri læruríkt at læra afrikanska fólkið at kenna, teirra mentan og siðir enn at halda saman við skandinavum, eru tey á einum máli um.

Hjúnini vænta at læra nógv av ferðini – eisini um tey sjálvi. Anne Lena sigur, at tá ein hevur verið miðnámsskúlalærari í 15 ár, tá er kanska tíð uppá at leita eftir nýggjum avbjóðingum.

– Ikki tí, eg elski mítt arbeiði, lat ongan iva vera um tað. Men um ein heldur áfram at krúpa í tí sama, so kann tað verða so skjótt, at ein verður ein keðiligur lærari, heldur hon smílandi fyri.

Tey vita so eisini um eitt annað føroyskt par, sum eisini er í Tanzania. Heri og Malan Kjærbo eru norðarlagari í landinum, vita tey at siga frá.

– Tað er eisini Lutherska Missiónskirkjan, sum hevur sent tey út, greiða tey frá.

Arbeiða svart

Olofson hevur fingist við eitt sindur av hvørjum, síðani hann fór úr sínum prestastarvi í Fuglafirði fyri fýra árum síðani. Hann hevur verið til skips, bæði í Flemish Cap

Men nú fer hann saman við konu síni at víðka sjónarringin enn meira við at fara til Tanzania at undirvísa komandi prestum.

Olofson greiðir skemtandi frá, at ein av teimum, sum hann hevur arbeitt saman við í fiskivinnuni á landi, kom til hansara ein dagin og segði, at hann hevði hoyrt, at prestur skal arbeiða svart nú.

Flennandi sigur Olofson, at strangt tikið hevur maðurin grein í síni útsøgn.

– Vit fara til eitt ókunnugt land at arbeiða, og óivað fara vit at seta okkum inn í eina nýggja mentan og nýggjar siðir, so á ein ella annan hátt er hatta ikki so langt við síðuna av, siga tey bæði Anne Lena og Peter O. K. Olofson.